# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Um vit skulu hava ein møguleika víðari í kappingini, er sigurin eitt krav.*
*Jákup á Borg, liðformaður hjá HB*

# Slagið um oddin og Havnina



*Oddadystur í Formuladeildini verður mikukvøldið, tá HB og B36 bresta saman í Gundadali. Dysturin verður samstundis annað slagið um Havnina í ár. Fyrri dysturin endaði við javnleiki.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Annað liðið kann missa eitt týdningarmikið fet í oddastríðnum, meðan hitt liðið kann missa sambandið við oddin, tá ið HB og B36 bresta saman í Gundadali í annaðkvøld**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Í annaðkvøld verður dystur nummar 71 í ársins útgávu av Formuladeildini. Talan er um eina framskundaða grannauppgerð, sum stendur í Havnini millum HB og B36. Dysturin er framskundaður orsakað av at graslíki á ovara vølli í Gundadali skal skiftast um vikuskiftið.

Fyri HB skulu stigini brúkast til at halda sambandið við oddin, meðan B36 skal royna at renna aftaná NSÍ, sum eru trý stig á odda.

### Trý lið møguleikan

Grannauppgerðin er dystur í 15. umfari av deildini. Í hesum umfarinum hava heili trý lið møguleikan at leggja seg á ovastu rók. Við einum stigi móti EB/Streymi sunnudagin, heldur NSÍ fast um oddasessin. Snáva teir, hava bæði B36 og EB/Streymur møguleikan at taka yvir forkunnuga plássið, sum í so fall verður avgjørt við málúrtøku.

### HB spælir sítt spæl

Liðsformaðurin hjá HB heldur, at liðið skal inn at spæla sítt egna spæl í annaðkvøld.

– Um vit skulu hava ein møguleika víðari í kappingini, er sigurin eitt krav, sigur Jákup á Borg, og vísur á, at leikararnir hava gjørt tað trupult fyri seg sjálvar í fleiri dystum.

Jákup heldur, at tann eyka stríðsviljin altíð er til staðar í hesi grannauppgerðini.

– Soleiðis vil tað altíð vera. Hendan uppgerðin er tann størsta í landinum, og hesin dysturin hevur nógv at siga, sigur Jákup á Borg.

### Sigurin eitt krav

Kenneth Jacobsen, liðformaður hjá B36, heldur, at sigurin er eitt krav hjá B36.

– Fyri at hanga í NSÍ er sigurin er eitt krav. Vit kunnu altíð dúva uppá eitt gott úrslit í hinari oddauppgerðini, men dysturin skal vinnast, heldur Kenneth Jacobsen, sum í dystinum móti EB/Streymi fyri fyrstu ferð í ár byrjaði á beinkinum.

Hann vil ikki avskriva meistaraheitið, um liðið nú skuldi snávað.

– Eitt tap hevði verið tungt, men tað eru nógvir dystir eftir enn, sigur Kenneth, sum ikki heldur dystin móti HB vera øðrvísi enn aðrar dystir.

# Badmintonskúli fyri øll børn í Føroyum

BADMINTON
*Tíðindaskriv*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð skipar Badminton Samband Føroya fyri badmintonskúla í Føroyum. Ætlanin er at byrja beint eftir seinasta skúladag. Tað vil siga, at skúlin verður frá vikuna 2. til 6. Juli. Landsliðvenjarin, Tobias Effersøe, sum er ein av stigtakaranum, sigur, at skráin er sera fjølbroytt.

Millum annað skipar skúlin fyri ymiskum innan- og uttandura spølum. Ein av døgunum verður farið niðan í svimjihøllina í Gundadali og seinasta dagin verður ein stór kapping og hugnaløta. Tó fer størsti partur av tíðini til badminton.

Fyriskipararnir siga, at øll børn í Føroyum millum 7 og 15 ár eru sera vælkomin at luttaka. Eitt lið er í løtuni í Havn, men eisini aðrastaðni, til dømis í Vestmanna og Fuglafirði eru badmintonlið.

Badmintonhøllin í Klaksvík verður skjótt liðug, og tað hevði verið stuttligt at sæð børn haðani, sigur Tobias Effersøe.

Badmintonskúlin verður í Badmintonhøllini í Gundadali í Havn, og kostnaðurin fyri alla vikuna er 200 kr. Venjarnir verða Marjun Niclasen og Tobias Effersøe. Afturat sær hava tey bæði tveir hjálparvenjarar.

Fólk, sum eru áhugað í at melda seg til ella sum ynskja nærri upplýsingar, kunnu fara inn á heimasíðuna www.bsf.fo ella kunnu tey seta seg í samband við Tobias Effersøe á teldupost: t@effersoe.dk ella á tlf. 522350. Seinasta freist at melda seg til badmintonskúlan er hósdagin 28. juni.